## Tónleikur við tilknýti til Ungverjalands

Næstu dagarnar verða tríggjar konsertir við Tórshavnar Klavertrio, har tónleikur við tilknýti til Ungverjalands verður á skránni. Trioin er mannað við Sámali Petersen, fiólleikara, Tóra Restorff Jacobsen, selloleikara og Jóhannesi Andreasen, klaverleikara. Á konsertunum fer trioin at spæla verk eftir Joseph Haydn, Zoltán Kodaly og Johannes Brahms.

Fyrsta konsertin verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum nú fríggjakvøldið 16. mars kl. 19.30. Síðan verður ein konsert í Sandavágs kirkju, sum júst hevur fingið nýtt klaver. Tann konsertin verður mikukvøldið 21. mars kl. 19.30. Og tann seinasta konsertin verður so í Læraraskúlahøllini í Havn hóskvøldið 22. mars kl. 19.30.

## Somu møguleikar

Meginfelag teirra brekaðu, Ráðið fyri brekað, Arbeiðsgevarafelagið, Arkitektafelagið, Handverkmeistarafelagið og tey bæði kommunufeløgini hava heitt á lmyndugleikarnar um at gera eina landsbyggireglugerð, sum skal tryggja fólki við skerdum førleika somu møguleikar, sum onnur hava. Laila Solmunde, forkvinna í MBF, sigur við Útvarpið, at tað er ein sjálvfylgja, at tey við skerdum førleika skulu hava somu møguleikar sum hini.

# Nú er klárt at fara undir skúladepilin í Suðuroynni

**Sáttmáli um bygginga verður undirskrivaður fyrsta dagin og so verður farið undir sjálva byggingina**

SKÚLADEPIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er loksins klárt at fara undir ætlanin at byggja skúladepilin í Hovi.

Í morgun hevur Løgtingið endaliga avgreitt málið um at játta seinastu pengarnar til ætlanina og nú skal endaligur sáttmáli gerast við MT Højgaard, sum skal byggja skúlan.

Kristian Rasmussen á Landsverki, sigur, at tað verður fyrsta dagin, at byggisáttmálin verður undirskrivaður og so verður farið undir byggingina.

Ætlanin var, at skúlin skuldi kosta 60 milliónir krónur, men tá ið lýst var eftir byggifeløgum, sum vóru áhugað at bjóða upp á arbeiðið, var tað bara MT Højgaard, sum gjørdi vart við seg.

Síðani varð gjørt av, at Landsverk skuldi fara undir samráðingar við byggifelagið um eina partalagsavtalu.

Tær samráðingarnar vístu, at skúlin fer at kosta 74 milliónir, ella 14 milliónir meir enn Løgtingið hevur játtað.

Tí bað Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í Mentamálum, Løgtingið játta 14 milliónir afturat.

Og tað gjørdi Løgtingið endaliga í morgun og sostatt er klárt at fara undir byggingina.

### Royndi til tað síðsta

Tjóðveldisflokkurin royndi annars til tað allar seinasta, at forða fyri at hendan ætlanin verður sett í verk, soleiðis, sum tað nú liggur í kortunum.

Tá ið Løgtingið viðgjørdi málið týsdagin, skeyt Tjóðveldisflokkurin upp, at skúladepilin verður bygdur í Vági, at hann ikki skal kosta meiri enn 60 milliónir og at arbeiðið verður boðið út.

Hetta uppskotið feldi Løgtingið.

Og nú Løgtingið viðgjørdi málið fyri seinastu ferð í morgun, skeyt flokkurin einaferð enn upp, at skúladepilin verður boðin út.

Men hesuferð var kravið slept um, at hann ikki mátti kosta meiri enn 60 milliónir krónur og kravið varð eisini slept um, at hann skuldi byggjast í Vági.

Men heldur ikki hesum fekk Tjóðveldisflokkurin undirtøku fyri.

Sostatt hevur Løgtingið samtykt, at Landsverk skal gera byggisáttmála við MT Højgaard um at byggja skúladepilin í Hovi fyri 74 milliónir krónur.

### Sett út av spælinum

Tjóðveldisflokkurin tvíheldur um, at skúlin skal bjóðast út einaferð enn, tí annars verða marknaðarkreftirnar skúgvaðar til viks og sostatt fáa vit ikki at vita, hvar tann rætti prísurin er.

Flokkurin vísti eisini á, at høvdu byggifeløgini vita, at skúlin kundi kosta 74 milliónir, høvdu tey eisini kunna bjóða seg fram.

Men Kristian Rasmussen á Landsverki tvíheldur um, at tað er meiningsleyst at bjóða skúlan út aftur.

- Vit hava lýst eftir fyritøkum sum vóru áhugaðar at byggja skúlan og hava fingið at vita, at ongin áhugi var. Tí er ongin meining í at bjóða út aftur.

- Vit halda tvørturímóti, at verður skúlin bjóðaður útaftur, gevur tað byggifyritøkunum ein trumf at tær sjálvar áseta byggikostnaðin.

Høvdu fleiri fyritøkur ikki havt áhugað, vissi tey vistu, at hann kostaði 74 milliónir í staðin fyri 60?

- Hatta eru eftirrationaliseringar, sum ikki geva nakra meining. Fyri tað, um 60 milliónir vóru játtaðar, er tað ikki eitt prógv um, at skúlin veruliga kostar 60 milliónir, tí hetta er eitt gamalt tal. Vóru fyritøkur áhugaðar, høvdu tær meldað seg til og høvdu biðið um útbjóðingartilfar, akkurát, sum MT Højgaard gjørdi.

- Men tað var ongin, sum bjóðaði seg fram. At so nágreiningar vístu, at skúlin verður dýrari er so nakað annað, sigur Kristian Rasmussen.

- Ístaðin hava vit samráðst okkum fram til tann lægst møguliga prísin. Sostatt er ongin ivi um, at 74 milliónir er tann rætti prísurin.

### Fáa fult innlit

Í eini partalagsavtalu liggur eisini í tí, at Landsverk fær innlit í øll skjøl í sambandi við byggingina og eisini innlit í tilboðini frá undirveitarum hjá MT Højgaard, sum í allarflestu førum eru føroyingar – og í størran mun eisini fyritøkur í Suðuroy.

- Og kostar skúlin minni enn 74 milliónir, býta byggifelagið og Landið vinningin.

- Verður skúlin dýrari, betalir MT Højgaard tað mesta av meirkostnaðinum.

Men hvussu býtið er ímillum byggifelag og Landið, vil Kristian Rasmussen ikki siga, tí tað er innanhýsis ímillum partarnar.

Í Løgtinginum vísti Tjóðveldisflokkurin á, at byggingin kann verða steðgað, tí at spurningurin um vatn og kloakk er ikki avgreiddur.

- Tað er vanligt, at tann parturin, sum liggur uttanfyri matrikulnummarið, er ikki við í prísinum, tí tað eru kommunalir spurningar.

- Tað sigur seg sjálvt, at onki er avgreitt, fyrrenn vit eru farin at byggja. Men tað er ein kommunalur spurningur og vit samráðast við Hovs Kommunu um spurningin.

- Hovs kommuna hevur ætlanir um at leggja nýggja vatnveiting til bygdina framvið stykkinum, skúlin skal byggjast á og vit samráðast nú um uppíbinding.

- Og tað verður eitt mál, sum tað ongin trupulleiki er at loysa í byggitíðini, sigur Kristian Rasmussen.

Tað, sum liggur í kortunum, er, at skúladepilin skal vera liðugur at taka í nýtslu eftir summarfrítíðina í 2008.



*Nú verður fyrsta dagin farið undir at byggja skúladepilin í Hovi, tí í morgun fingust teir seinastu pengarnar í rættlag*



*Serfrøðingur er á veg til Føroyar at kanna brekið í stabilisatorunum á Smyrli og tá fæst at vita um tað ber til at umvæla brekið ímeðan Smyril er í sjónum, ella um hann skal í dokk*

# Smyril fer at rulla í eina tíð afturat

**Enn er óvist, nær Smyril fær stabilisatorarnar aftur**

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn ber ikki til at siga, nær stabilisatorarnir á Smyrli fara at virka aftur. Niels Juel Arge, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at ein serfrøðingurin frá verksmiðjuni, sum ger stabilisatorarnar, er á veg til Føroyar at kanna brekið.

Hann kemur vónandi hesa vikuna og tá ið hann hevur kannað brekið, ber til at staðfesta um tað kann umvælast, ímeðan Smyril er í sjónum, ella um tað er neyðugt at fáa hann í dokk til umvælingar.

Verður neyðugt at fáa Smyril dokk, verður kannað eftir, um tað ber til at fáa hann í dokk beinanvegin.

Men stjórin í Strandferðsluni sigur, at verður neyðugt at fáa hann í dokk, er talan um eina nýggja støðu, tí so væntar hann, at miðjað verður eftir at gera alt eftirlitið, sum skal gerast, fyri at sleppa undan at senda hann í dokk aftur í september, sum ætlanin annars hevur verið.

Niels Juel Arge sigur, at tað er í bæði borð, at stabilisatorarnir eru farnir.

Talan er um ein flansi, sum heldur einum pakningsringi niðri, sum er farin.

Sostatt lekur olja út ímillum og fyri at bøta um heilan fingur, varð avgjørt at taka stabilisatorarnir inn til serkønur frá verksmiðjuni hevur kannað brekið.